*Lagt til rættis: Bjørk K. Olsen*
*Myndir Sunva Eysturoy Lassen*

# Jesus pápi skapti ballónirnar

## Tað er ikki altíð so lætt at minnast, hví vit halda ólavsøku. Vit hava spurt nøkur børn í Hoyvíkar frítíðarskúla, hvat tað í grundini er, vit hátíðarhalda hesar dagarnar

**Emma Annika Thomsen, 7 ár**

– Vit halda ólavsøku, tí at Jesu pápin varð doyptur, og vit feira, at Jesu pápin reis upp til himmals. Vit hava hoppiborgir, ballónir og tombola, tí at Jesu pápin hevur skapt tey



**Ragnar Rasmussen, 7 ár**

– Eg veit ikki, hví vit halda ólavsøku, men eg eri ikki flovur av tí





**Niels Persson, 7 ár**

– Vit halda ólavsøku, tí at ein kongur, sum eitur Ólavur, doyði tá. Hann var kongur í Føroyum, og vit feira, at hann bestemmaði, og tað var nokkso gott



**Maria Jónsdóttir Otthamar, 7 ár**

– Vit halda ólavsøku, tí at ein maður, sum eitur Òlavur, hevur føðingardag, og tí at tað er stuttligt



**Silja Sámalsdóttir, 8 ár**

– Vit halda ólavsøku, tí at Jesus bleiv føddur - tann, sum ansar eftir okkum. Vit hava pakkaspøl, tombola og fiskaspæl, tí at hann vil hava, at vit skulu hava tað gott. Jesus er 100 ár



**Turið Biskopstø, 7 ár**

- Vit halda ólavsøku, tí at so fær mann eina góða summarferiu, tí tá prøvar mann so nógv stuttligt.

*Hví eitur tað so ólavsøka?*

- Tí at tá koma nógvir útlendingar til Føroya.

*Hví koma teir til Føroya?*

- Tí at ólavsøka er ikki í Danmark, tí har er so nógv annað stuttligt

ólavsøkan 2008

**Útgevari:**
Sosialurin

**Redaktørur:**
Anna V. Ellingsgaard

**Blaðfólk:**
Árni Joensen
Anna V. Ellingsgaard
Bjørk K. Olsen
Eirikur Lindenskov
Eyðun Klakstein
Eydna Skaale
Jákup Mørk
Jan Müller
Jóannes Hansen
Justinus L. Eidesgaard
Leo Poulsen
Magnus Gunnarsson
Rólant Waag Dam
Rógvi Nybo
Símun úr Konoy
Snorri Brend
Sólvit Nolsø
Sunneva H. Eysturstein
Uni Holm Johannesen

**Myndir:**
Álvur Haraldsen
Jens Kristian Vang
Mureldur

Forsíðumynd: Mureldur/
Sunva Eysturoy Lassen

**Lýsingar:**
Marknaðardeildin

**Umbróting:**
Sosialurin

**Prent:**
Bornholms Tidende